# KLAKSVÍKSINGAR VUNNU GAMLA KLASSIKARIN

**FÓTBÓLTUR** Teir vóru ágangandi, skapandi, stríðshugaðir og betri enn eitt tungt og hugflogstómt HB-lið, sum nærkast kreppu. KÍ vann í gjár greiðasta sigurin á HB í mannaminni og serliga vóru tað teir tríggir á miðvøllinum, Hjalgrím Elttør, Høgni Madsen og Nenad Stankovic, sum vóru rótin til góða KÍ spælið

Tróndur Arge – Gundadalur

| | |
|---|---|
| HB | 1 |
| KÍ | 4 |

Sjáldan hava tónarnir til »HB mítt havnar lið« sangin ljóðað so kámir úr hoytalarunum í Gundadali, sum tá dómarin bríkslaði fyri hálvleiki í dystinum millum HB og KÍ í gjár. Ikki bara var støðan 2-0 til KÍ, men hon kundi verið tað tvífalda og, gestirnir úr Klaksvík brosaðu av spæligleði og orku. Ongantíð slapp ein havnarmaður at nerta bóltin uttan at ein grammur klaksvíksingur var í rygginum á honum og elti bóltin. Tað varð runnið, bart og stríðst um hvønn einasta ein leysa bólt.

HB-liðið sá hinvegin tungt út og hugflogið var lítið. Telepatiska samanspælið millum Rók av Fløtum og Páll M. Joensen, er vorðið til langar sendingar, sum eru torførir at arbeiða við og, sum mangan ikki koma vegin fram. Neyvu sendingarnar hjá Rasmusi Nolsøe eru útskiftar við neyðspørk. Einsamallur á brúnnið er Fróði Benjaminsen, sum lítið megnaði at gera móti væl spælandi KÍ miðvøllinum.



Mynd: Álvur Haraldsen

**» Einasta løtan í dystinum, har HB tyktist hava nakað, sum minnir um eitt trýst á KÍ málið er rundan um 2-1 málið hjá Símuni Samuelsen**

### KÍ leggur bragliga fyri

Tað hevur regnað illa fyrra partin og vøllurin í Gundadali er vátur. Tað plagar at hóva vertinum væl, men gamli klassikarin er bara fáar minuttir gamal, tá Hjalgrím Elttør við góðum skoti gevur fyrstu ábendingina um, at KÍ eru ikki komnir í Gundadal at grava seg niður. Undan dystinum høvdu teir ikki skorað í fýra dystum og í HB leguni kvittaðu teir við at spæla við teimum framherjum og bara tveimum á miðvøllinum, tí ongin roknaði við KÍ hendan sunnudagin – uttan KÍ sjálvir.

### Týdningarmiklasta málið

Fyrri hálvleikur er hálvrunnin, tá KÍ fær fyrsta málið. Helst mundi tað vera innskifti Ivan Joensen, ið sleit seg leysan í teirra høgru síðu, áðrenn hann legði bóltin innfyri. HB-verjan fær ikki ruddað vekk. Ruðuleiki ræður í fimmetrinum. Bólturin endar millum beini á Heðini Stenberg, sum tykist hava fingið tamarhald á støðuni. Men brádliga kemur Kristoffur Jacobsen ágrýtin og prikar bóltin. Hann fær fótin á, og bólturin fer í málið. Meðan KÍ leikararnir fegnast, standa HB leikararnir og skilja einki.

### Eitt spæl um sentrimetrar

Átta minuttir fyri hálvleik økir KÍ um leiðsluna. Minuttin fyri rakar Jón Krosslá Poulsen stongina við dundur skoti og KÍ sleppur við skrekkinum. Løtu eftir er opið í vinstru síðu og vinstri bakkurin hjá KÍ, Jógvan Isaksen, fær frítt spæl. Hann dregur frameftir og endar við at ótarnaður at kunna spæla Hjalgrím Elttør leysan í HB brotsteiginum. Liðskiparin er tryggur og eftir eitt trekk er hann leysur og leggur KÍ á odda 2-0.

### HB svarar aftur

Einasta løtan í dystinum, har HB tyktist hava nakað, sum minnir um eitt trýst á KÍ málið er rundan um 2-1 málið hjá Símuni Samuelsen. Hvørki Símun Samuelsen ella Jón Krosslág Poulsen vóru eyðsýndir